

## HART

*Hóast úrslitini hjá FC Suðuroy ikki hava verið ov góð higartil í kappingini, bilar einki við moralinum á liðnum. - Vit ætla at hóra undan í Vodafone-deildini í ár. Men tað verður trupult, sigur Henning Joensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## ÚRSLIT = ÁSKOÐARAR

Úrslitini – ella mangulin uppá úrslit - hava sjálvandi havt sína ávirkan á stuðulin frá áskoðarunum.

Teir fyrstu dystirnar lá talið av áskoðarum til heimadystirnar um 250 og kom seinni upp á 400, tá B36 og Víkingur spældu á Eiðinum í Vági.

– Ja, vit hava lagt merki til, at tað eru munandi færri áskoðarar við okkum til útidystirnar nú, enn hvat tað var at byrja við. Og tað sama ger seg tíverri eisini galdandi, tá vit spæla heimadystir, sigur Henning.

Ístaðin fyri at venda peikifingrinum ímóti trúføstu áskoðarunum, vendir Henning heldur hinar fýra fingrarnar ímóti sær sjálvum og hinum á liðnum.

– Hetta er bara ein áheitan á okkum allar um at venda gongdini. Um vit gera tað, so fara áskoðararnir heilt sikkurt at koma aftur.